H E I L S U F R Ø Ð I L I G A S T A R V S S T O V A N

Tórshavn, hin 09. november 2004
Málnr.: 613-200400296-7
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: AJ / Tlf.: 35 64 20

Faroe Farming P/F
Postrúm 97
FO-900 VÁGUR

Umhvørvisdeildin

Umhvørvisgóðkenning av virkinum hjá P/F Faroe Farming í Vági

Hendan umhvørvisgóðkenning av virkinum hjá P/F Faroe Farming, matrikul nr. 168C í Vági, og einum mobilum blóðgianleggi, er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk tann 28. juni 2004 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá P/F Faroe Farming í Vági.

Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av luft, vatni og jørð, og at byrgja fyri larmvansum.

Herundir at leggja dent á:

- Meginregluna um nýtslu og burturbeining: Minka nýtsluna – endurnýta – endurvinna – brenning við orkuendurvinning – burturbeining.
- At umhvørvisliga best tøka tøknin (BAT) í størst møguligan mun verður nýtt.
- At virkið hevur innaneftirlit.

Lýsing av virkinum

Umhvørvisgóðkenningin umfatar eitt mobilt blóðgianlegg og sjálvt kryvjivirkið, sum er staðsett í Vági. Fiskur verður hóvaður upp úr ringi við vakuumpumpu inn í blóðgianleggið. Laksurin verður fluttur til virkið, har hann verður kruvdur og ísaður. Slógvið verður selt. Blóðvatn frá mobila blóðgianlegginum verður flutt í tanga til virkið, har tað verður reinsað í reinsiskipanini.

Falkavegur 6, 2. sal
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av ásetingunum í fylgiskjali 1.

Harumframt eru fylgjandi treytir galdandi:

a. Virkið skal seta vatnmátara upp, sum mátar vatnnýtsluna hjá virkinum.

b. Sum innaneftirlit skal virkið taka 4 sýni av spillivatninum um árið. Sýnini skulu takast javnt býtt yvir alt árið. Sýnini skulu takast úr sýnistøkubrunninum, ið skal vera eftir mekanisku reinsingina hjá virkinum, meðan virkið er í fullum rakstri.

c. Virkið skal lata gera kanningar av spillivatninum, fyrstu ferð innan 2 mánaðir aftaná, at treytirnar eru komnar í gildi.

d. Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka, at virkið, í eitt 1 ára tíðarskeið aftaná at umhvørvisgóðkenningin er givin, miðar ímóti at halda markvirðini fyri feitt (50 mg/l), botnfelliligt evni (10 ml/l) og suspenderað evni (300 mg/l) ásett í treyt 5.8 í fylgiskjali 1 fyri spillivatn. Um virkið hevur trupulleikar at halda markvirðini 1 ár eftir hendan góðkenning er komin í gildi, skal skrivlig frágreiðing og tíðarætlan fyri møguligar betringar latast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, ið síðani tekur avgerð um í hvønn mun ásettu markvirði skulu haldast framyvir.

e. Fyri at meta um dálkingarstøðuna, skal P/F Faroe Farming gera kanningar av botninum nærhendis spillivatnsútleiðingini frá virkinum 1 ferð um árið. Kanningin skal gerast í august / september. Áðrenn kanningin verður gjørd, skal kanningarskrá gerast og góðkennast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

f. Sýnini frá kanningini av botninum nærhendis spillivatnsútleiðingina skulu kannast fyri gløðitap, pH, redoxpotentiali, innihald av total-fosfor og total-nitrogen. Sýnini skulu lýsast kvalitativt við atliti at sedimenttjúkd, lukti, liti, konsistensi og um bløðrur og djóralív síggjast. Víðkað kanningarskrá kann í serligum føri verða umbiðin av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

g. Virkið skal minka mest møguligt um nýtsluna av klori og skal arbeiða fram ímóti meira umhvørvisvinarligum sóttreinsingarhátti av spillivatninum.

h. Umframt tær í fylgiskjali 1, parti 9 umbidnu upplýsingarnar, skal P/F Faroe Farming skráseta vatnnýtsluna.

i. Árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingunum, frágreiðing um umhvørvisviðurskifti herundir punkt g, innaneftirlit, tulking av møguligum kanningarúrslitum, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk o.a. skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum

Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin í umhvørvismálum við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Vinarliga

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

Hjálagt: Fylgiskjal 1.

Avrit: Vágs kommuna, Postrúm 29, FO-900 Vágur.

Fylgiskjal 1

Góðkennningartreytir

1 Innrætting og rakstur

1.1 Virkið skal innrættast og rekast í samsvari við tær upplýsingar, sum eru í umsóknartilfarinum.
1.2 Virkið skal rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar altíð verða hildnar.
1.3 Øll øki, sum hoyra til virkið, skulu haldast ruddilig.
1.4 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga merkt.
1.5 Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt, fyri at avmarka dálkingina mest møguligt.
1.6 Virkið hevur skyldu til altíð at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]) fyri at minka mest møguligt um øll útlát, og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar.
1.7 Evni, ið verða nýtt, skulu hava minst møgulig árin á umhvørvið.
1.8 Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

2 Goymslur

2.1 Evni og tilfar, ið kunnu dálka, skulu goymast soleiðis, at einki útlát til umhvørvið kann fara fram. Goymslur skulu innrættast soleiðis, at møguligir lekar og spill kunnu haldast aftur.
2.2 Evni, ið eru á goymslu uttandura, skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni.

3 Óljóð, ristingar og ljós

3.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A), fer upp um niðanfyristandandi mørk máld við næsta grannamark í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

Dagur	Tíð	Øki 1	Øki 2	Øki 3	Øki 4
Mán – frí	07.00 - 18.00	70	60	55	45
Leyg	07.00 - 14.00	70	60	55	45
Mán – frí	18.00 - 22.00	70	60	45	40
Leyg	14.00 - 22.00	70	60	45	40
Halgi	07.00 - 22.00	70	60	45	40
Allir dagar	22.00 - 07.00	70	60	40	35

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

3.2 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.
3.3 Virksemið skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

[1] Best Available Techniques.

4 Útleiðing til luft

4.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av royki, lukti ella dusti.
4.2 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.
4.3 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

5 Spillivatn

5.1 Alt spillivatn skal leiðast í spillivatnsleiðing á sjógv.
5.2 Munnin á útleiðingini skal vera minst ein metur undir vatnskorpuni.
5.3 Spillivatn skal viðgerast soleiðis, at evni og tilfar í størst møguligan mun verða tikin burtur, fyri at fyribyrgja dálking av umhvørvinum.
5.4 Spillivatn, sum inniheldur olju ella feitt, skal reinsast, t.d. við olju- ella feittskiljara.
5.5 Reinsiskipanir til spillivatn skulu reinsast og røkjast soleiðis, at tær altíð virka til fulnar, tó í minsta lagi eina ferð um árið.
5.6 Tað skal vera gjørligt at taka sýni av reinsaða spillivatninum.
5.7 Spillivatnið má ikki hava við sær sjónliga slóð í sjónum.
5.8 Spillivatnið skal yvirhalda hesi markvirði:

Evni	Markvirði	Kanningarháttur
Olja (mineral)	Max. 10 mg/l	DS/R 208
Olja/feitt	Max. 50 mg/l	DS/R 208
Botnfelliligt evni	Max. 10 ml/l	DS 233
Suspenderað evni	Max. 300 mg/l	DS 207
PH	6 - 9	

6 Burturkast

6.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2].
6.2 Burturkast skal goymast soleiðis, at tað ikki er til ampa.
6.3 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og skal skiljast sambært ásetingum móttakarans.

7 Tilbúgving og óhapp

7.1 Undir arbeiði, har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.
7.2 Gerast skal ein meting av møguligum vanda fyri óhappum, sum kunnu hava útlát av dálkandi evnum við sær.
7.3 Virkið skal hava mannagongd til fyribyrging av dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.
7.4 Virkið skal, um neyðugt, hava útgerð til upprudding eftir møgulig dálkingaróhapp.
7.5 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.
7.6 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.[3]

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, og kunngerð nr. 40 frá 09-04-1992, um lívrunnið burturkast frá alivinnuni.
[3] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

8 Innaneftirlit

8.1 Virkið skal alla tíðina tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

8.2 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja skjalprógv fyri, at góðkenningartreytirnar í umhvørvisgóðkenningini og treytirnar í fylgiskjalinum (3. parti, um óljóð, ristingar og ljós, 4. parti, um útleiðing til luft, og 5. parti, um spillivatn), verða hildnar.

8.3 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja, at kanningar verða gjørdar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

8.4 Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av persóni ella felag, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka.

8.5 Sýnistøkur og kanningar skulu gjaldast av virkinum.

9 Rakstrarskráseting

9.1 Hesar upplýsingar skulu skrásetast:

- Nøgd og slag av rávørum og kemikalium
- Framleiðsla av lidnari vøru
- El- og oljunýtsla
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti við tilskilan av slagi og móttakara
- Røkt av reinsiskipanum
- Óhapp, sum hava havt útlát ella vanda fyri útláti við sær
- Annað av umhvørvisligum týdningi
- Úrslit og eygleiðingar (checklistar) í sambandi við innaneftirlit

9.2 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og teir skulu vera til taks hjá eftirlitsmyndugleikanum.

9.3 Virkið skal eftir umbøn frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni senda inn rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í hóskandi sniði og uppseting.

9.4 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja aðrar skrásetingar enn tær, ið eru nevndar undir 9.1.

10 Almennar treytir

10.1 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

10.2 Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á virkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

10.3 Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

10.4 Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

10.5 Í 5 ár aftaná at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

10.6 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.